## Gerðabók hjá Vestmanna Bygdarráð
## Bygdarráðsfundur tann 29. mai 2024, kl. 17.00

**Bygdarráðslimir á fundi:** Bjørg á Rógvi, Sára Jógvansdóttir, Laila Haldansen, Anja Haldansen, Ingi Olsen og John Zachariassen.
**Skrivari:** Rúna Ingunardóttir

---

Vísandi til grein 18, stk. 2, í løgtingslóg nr. 87 frá 17. mai 2000 um kommunustýri boðaði Pauli T. Petersen frá 29. mai 2024 frá, at honum barst frá at møta á fundinum.
1. tiltakslimur John Zachariassen fekk fundarboð 29. mai 2024 og játtaði at møta.

Til viðgerðar fyri **opnari hurð**:

**Mál 279**
Ársroknskapurin hjá Vestmanna kommunu fyri 2023.
J.nr. 32002-1-2024

**Viðv. 279**
Á fundinum skeyt Bjørg á Rógvi, borgarstjóri, upp at samtykkja ársroknskapin fyri Vestmanna kommunu fyri 2023.

Uppskotið hjá Bjørg á Rógvi, borgarstjóra varð einmælt samtykt.

**Mál 280**
Skipan av Eldraráði fyri VEKS
J.nr.: 22042-1-2024

Stýrið fyri VEKS samtykti á stýrisfundi í Kvívík tann 16. mai 2024 at taka undir við einum uppskoti frá formanninum, Jógvan Kruse, um at skipa eitt eldraráð fyri VEKS.

Uppgávan hjá Eldraráðnum er at upplýsa, ráðgeva og tilmæla tiltøk, sum byggja upp samskiftið millum eldra borgaran og VEKS.

"Ætlanin er sostatt, at hvør kommuna sær samtykkir nýggja leistin hjá Eldraráðnum, og at valið til Eldraráðið verður í í heyst og kemur at fylgja kommunuvalskeiðinum."

**Viðv. 280**
Tilmælið frá stýrinum fyri VEKS varð einmælt samtykt.

**Mál 281**
Umraðfesting av játtan til økið rundanum matr.nr. 187d til 2. viðgerð
J.nr.: 30102-1-2023

Mentanarnevndin umrøddi á fundi tann 8. apríl 2024 mál um at seta fleiri neyst í stand við Krambúðina. Nevndin samtykti einmælt at heita á Trivnaðar- og umhvørvisnevndina um at loyva umraðfesting av játtan til Gjógvaráætlanina til tess at seta fleiri neyst í stand niðanfyri Krambúðina.

Trivnaðar- og Umhvørvisnevndin viðgjørdi áheitanina frá Mentanarnevndini á fundi tann 8. apríl 2024. Nevndin samtykti einmælt at mæla til, at játtanin á kr. 100.000 til Gjógvaráætlanina verður umraðfest til neyst ella hjall á matr.nr. 187d.

Bygdarráðið samtykti einmælt umraðfestingina á fundi tann 17. apríl 2024 við 1. viðgerð.

**Viðv. 281**
Bygdarráðið samtykti einmælt umraðfestingina við 2. viðgerð.

**Mál 282**
Umsókn um sundurbýti av matr. nr. 45z til samanlegging við matr. nr. 189b og umsókn um sundurbýti av matr. nr. 189b.
J. nr. 104002-4-2024

Tekniska Nevnd viðgjørdi á fundi 21. mai 2024 umsókn um sundurbýti av matr. nr. 45z hjá Dánjal Jákup Andreasen til samanlegging við matr. nr. 189b og umsókn um sundurbýti av matr. nr. 189b hjá Jaspur Andreasen.

Nevndin mælir til at viðmæla umsóknunum.

**Viðv. 282**
Tilmælið frá Teknisku Nevnd varð einmælt samtykt.

*Anja Haldansen fór av fundinum vegna ógegni og luttók ikki í viðgerðini av máli nr. 283.*

**Mál 283**
Umsókn um leigu av neystalendi á matr. nr. 187d
J. nr. 8216002-2-2024

Tekniska Nevnd viðgjørdi á fundi 9. apríl 2024 umsókn frá Jan Haldansen um leigu av neystalendi við grund, sum er partur av matr. nr. 187d (Johnsa Handil).

Nevndin samtykti at leggja málið fyri Bygdarráðið at skifta orð um, eitt nú um ein heildarætlan skal gerast fyri alt økið.

Bygdarráðið umrøddi málið á fundi 17. apríl 2024 – at byggingin skal hóska til stílin í økinum og til ætlaða virksemið í økinum við Johnsa Handil. Bygdarráðið samtykti at leiga út sambært bíðilista, og at Tekniska Nevnd ger tilmæli til Bygdarráðið um eitt møguligt byggimál.

Síðani hava nakrir tankar stungið seg upp um, at tað kanska ikki er rætt at taka atlit til bíðilistan, tí talan í veruleikanum ikki er um eina vanliga neystagrund.

Tí hevur Bjørg á Rógvi, borgarstjóri, beint málið aftur í nevnd.

**Mentanarnevndin** umrøddi málið á fundi tann 13. mai 2024. Nevndin viðmerkti, at tað er umráðandi at Bygdarsavnið hevur møguleika at taka sær væl av søguligum lutum, herundir varðveitslu av bátum og at hava møguleika at vísa teir fram.

**Trivnaðar- Umhvøvisnevndin** umrøddi málið á fundi tann 16. mai 2024. Nevndin samtykti at viðmerkja, at frítíðarvirksemi er í tráð við Gjógvaráætlanina, og um lív kann fáast í økið er tað einans til gagns fyri trivnaðin hjá borgarum í Vestmanna kommunu.

**Tekniska Nevnd** viðgjørdi málið á fundi 21. mai 2024. Nevndin mælir til at ganga umsóknini um leigu á møti við vanligum leigutreytum. Í samband við bygging skulu nágreiniligari tekningar sendast inn, serliga brunatekningar.

**Fíggjarnevndin** viðgjørdi tilmælið frá Teknisku Nevnd á fundi 22. mai 2024. Nevndin samtykti einmælt at taka undir við tilmælinum frá Teknisku Nevnd.

**Viðv. 283**
Tilmælið frá Teknisku Nevnd og Fíggjarnevndina varð einmælt samtykt.

*Anja Haldansen var aftur á fundinum.*

**Mál 284**
Endurnýggjan av leigumáli á matr. nr. 36z og ø.
J.nr.: 8216002-3-2024

Fíggjarnevndin viðgjørdi á fundi 22. mai 2024 áheitan frá Vestmanna Fiskavirki um endurnýggjan av leigumáli á matr. nr. 36z og 36ø.

Nevndin samtykti einmælt at mæla til at samtykkja leigusáttmálan.

**Viðv. 284**
Tilmælið frá Fíggjarnevndini varð einmælt samtykt.

**Mál 285**
Umsókn frá Róki Johannesen um loyvi til at keypa eitt lítið petti av lendinum omanfyri hús teirra á matr. nr. 326y, Grótbrúgv 7.
J. nr. 8202002-2-2024

Tekniska Nevnd viðgjørdi málið á fundi tann 21. mai 2024. Nevndin mælir til at ganga umsóknini á møti.

Fíggjarnevndin viðgjørdi málið á fundi tann 21. mai 2024. Nevndin samtykti einmælt at taka undir við tilmælinum hjá Teknisku Nevnd og at selja fyri 250 kr fermeturin, og at keyparin rindar fyri asfalt og umskipan av lendi

**Viðv. 285**
Á fundinum skeyt Bjørg á Rógvi, borgarstjóri, upp, at kostnaðurin fyri fermeturin fylgir prísinum á grundstykkinum, og at fermeturprísurin í hesum málinum er kr 368 fermeturin.

Uppskotið hjá Bjørg á Rógvi, borgarstjóra varð einmælt samtykt.

**Mál 286**
Umsókn um byggiloyvi til nýtt neyst á matr. nr. 52 og partvíst á matr. nr. 36c.
J. nr. 10000042-1-2024

Tekniska Nevnd viðgjørdi á fundi 21. mai 2024 umsókn frá Magnus Gaard um byggiloyvi til nýtt neyst á matr. nr. 52 og partvíst á matr. nr. 36c. Nevndin mælir til ganga umsóknini á møti við vanligum treytum og at neyðug marknaumskipan verður gjørd í hesum sambandi.

Fíggjarnevndin viðgjørdi á fundi 22. mai 2024 tilmælið frá Teknisku Nevnd.
Nevndin samtykti einmælt at taka undir við tilmælinum hjá Teknisku nevnd, og at keypari rindar fyri umskipan av lendinum.

**Viðv. 286**
Tilmælið frá Teknisku Nevnd og Fíggjarnevndini varð einmælt samtykt.

**Gerðabók hjá Vestmanna Bygdarráð**
**Bygdarráðsfundur tann 29. mai 2024, kl. 17.00**

**Mál 287**
Umsókn frá Jórun Nielsen um keyp av lendi omanfyri sethús hennara á Garðavegi 18.
J. nr. 8202002-3-2024

Tekniska Nevnd viðgjørdi málið á fundi tann 21. mai 2024. Nevndin mælir til at ganga umsóknini á møti.

Fíggjarnevndin viðgjørdi málið á fundi tann 21. mai 2024. Nevndin samtykti einmælt at taka undir við tilmælinum hjá Teknisku Nevnd og at selja fyri 250 kr fermeturin, keypari rindar fyri umskipan av lendi

**Viðv. 287**
Tilmælið frá Teknisku Nevnd og Fíggjarnevndini varð einmælt samtykt.

**Mál 288**
Leiðreglur fyri Høllina
J.nr.: 1002-4-2024

Mentanarnevndin viðgjørdi á fundi 13. mai 2024 mál um leiðreglur fyri Høllina.

Til støðutakan varð uppskot frá umsitingini dagf. 10. mai 2024 um leiðreglur fyri høllina.

Nevndin viðmerkti at leggja afturat, at allir brúkarar virða amboðini hjá øðrum.
Nevndin viðmerkti at skúlin/undirvísing má hava fyrstu raðfesting, tí at tað er kravd lærugrein.

Nevndin samtykti at leggja uppskotið fyri Bygdarráðið við viðmerktu broytingum.

**Viðv. 288**
Tilmælið frá Mentanarnevndini varð einmælt samtykt.

Til viðgerðar fyri **afturlatnari hurð:**

**Mál 289**
Viðmerking ísmb. við niðankoyringina til matr. nr. 335c.
J. nr. 500002-1-2023

Bókin lisin. Fundurin lokin kl. 19:30

Sign.:

Bjørg á Rógvi Sára Jógvansdóttir Eyðun Hansen Laila Haldansen

Anja Haldansen Ingi Olsen John Zachariassen